H71

faldari 1

ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN

H71 - NEISTIN

Mikudagin 9. oktober kl. 19.00

Hoyvíkshøllin

BONUS

J&K

FØROYATELE

SUÐUROYAR SPARIKASSI

Advokatfelagið
Yviri við Strond

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari

bilrokt.fo

P/F THOMAS DAM
ITRÓTTARØEILDIN · N. Finsensgota 5 · Tel. 31 14 03

polytan

Við Betri pensjón hevur tú fult gjøgnumskygni. Tú sært, hvussu nógv tú sparir saman til eftirløn, hvussu nógv fer til tryggingar, og hvussu nógv verður goldið fyri umsiting.

Harafturat kanst tú fáa heilt upp til 32% í avsláttri, um tú samlar tínar tryggingar hjá Tryggingarfelagnum Føroyum og tína pensjón hjá Betri pensjón.

Set teg í samband við ein av okkara ráðgevum á tel 345 700 ella betri@betri.fo, so vit saman kunnu gjøgnumganga tíni tryggingar- og pensjónsviðurskifti.

betri.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR

Betri pensjón

ANNAÐ FÓLK, SAMA SPÆL, OG NÓGV AT GLEÐA OKKUM TIL

Eftir Agga Niclasen

Loksins heyst, og landskappingin í bestu deildunum er byrjað. Eins og undanfarin ár hava vit ein góðan hóp, sum við vild kann gera um seg; og tað hevði verið stuttligt at rokkið eina av tveimum finalum. Aftur í ár.

Sum í fjør, og árið frammanundan, eru vit øgiliga spent.

Og aftur í ár er fólk farið. Rógvi og Ári J. Olsen til Danmarkar, meðan Niels Viggo enn ikki er við. Og tað eru Hans Kári og Poul Kjartan heldur ikki.

Hinvegin, og lukkutíð, so hevur Sigmundur Dahl, sum tann einasti eftirverandi frá miðverjuni í fjør, valt Føroyar. Men Esbern er heimafturkomin, og Birgir Poulsen nýggjur í hópinum. Og kanska koma eitt andlit ella tvey afturat inn í hópin, so tað sær ikki so galið út.

Tað er støðufesti og tol, og hegnið at vera snilt inkluderandi, ikki at skúgva nakrarn burtur heilt óneyðugt ov tíðliga, ið aftur í ár kemur at seta sín dám á okkara vánir til flaggskipið í felagnum.

So, higartil alt við tað sama. Tó so, tí hesuferð kundi okkurt bent á, at vit vónandi byrja eitt sindur betri enn vanligt. Men tað kann eisini vísa seg at blíva neyðugt, tí kappingin fer, sambært serfrøðini, eftir øllum at døma at verða væl meiri spennandi enn undanfarin ár, har annaðhvørt Neistin ella KÍF beinanvegin hava kaprað tað eina FM-finaluplássið.

Tað hevur verið væl uppiborið, men ikki so gott fyri kappingina. Seinastu fimm árini hava VÍF verið favorittar til tað eina finaluplássið, tað veri seg í FM ella steypakappingini, men enn er bingjan eins buldrandi tóm og Julian Assange. Fyri tað skerst ikki burtur, at teir hava personalið at klára seg væl og enda í eini finalu ella tveimum. Nógv gott ungfólk, sum sæst aftur í eini útlendskari innrás, sum ikki stendur mát við hana fyrra kappingarár. Nývunnið álit, hugsi eg.

Hesa, altso innrásina, hava Kyndlarnir yvirtikið, og við so nógvum útlendingum mugu teir, bara av hesum!, teljast millum greiðar FM-favorittar. Sum onkur deilig VB-dama so skilagott segði í samrøðu við útvarpið sunnudagin, at keypir tú útlendskan leikara, so er tað tí, at har er ítøkilig ætlan um at vera við í toppinum.

Ein góður málmaður og tveir vengur og so kanska ein linjuspælari afturat. Grøna framtíðin boðar frá, at tað er av tí at hálvtannað lið er í DK, at felagið hevur keypt inn. Hasi grundgevingini hava vit øll sympati fyri, men tað sama kann væl sigast um Neistamenn, sum traditionelt ikki hava smíðað líka nógv hús sum teir grønu, og tí eru endaðir í Keypmannahavn í lestrarørindum.

Og H71. Total útskfiting, mestsum, fyri hvørja av teimum trimum ferðunum seinastu fimm árini, felagið er endað í FM-finalu.

Men har vanahugsan krevur leikarastyrk (til tess at styrkja felagið), hevur H71 satsað ungdóm og sett við so hvørt. Torført, men tað skal gerast. Nú ljóðar tað so xenofobiskt, ikki soleiðis meint, men í hesum sambandi hava vit eisini satsað útlendskt. Men ikki leikara-útlendskt, men venjara-útlendskt. Ikki eingong venjara til bestaliðið, til AA-liðið, men ein hondbóltsmennara, sum saman við leiðslu og høvuðsvenjara skal røkka og betra leikarar hjá H71 í ein mun, vit ikki áður hava sæð, men longi hava viljað. Hondbóltsmennarin, Flemming Oliver Jensen, fer at búleikast í høllini, har hann harafturat kemur at venja venjarar og yvirhøvur leggja lag á.

Vit í H71 halda, at hetta kann heimilast fyri øllum limum, og fer vónandi eisini at gera okkum minni bundin av útlendskari leikaramegi við framtíðini í huga. Ikki so øðrvísi boðskapur enn tann, vit hálvhernaðarliga royna at fortelja okkara politikarum: at hugsa langsiktað...

Mótstøðuliðið íkvøld er tað, ja, unga, men tó meiri órutinerøða liðið hjá Áka Mørk, sum tók nærum øll á bóli í fjør við seigum og óvanliga skilagóðum spæli. Finna teir sama spælivilja sum í fjør, og stuðla hvørjumøðrum tvørturígjøgnum kappingarárið, tá fara teir bláu úr Havn so avgjørt at arga øll hini liðini, sum mitt í tí heila øll eru endað sum FM-favorittar.

Enter Team Klaksvík. Sambært sær sjálvum skulu teir nú eisini roknast sum FM- og steypafavorittar. Ikki eiti á statement, frá at hava fingið akkurát null stig kappingarárið 2012-13, til nú at skula fáa mest ella næstflest stig av øllum.

Jú, har koma onkrir útlendingar, og teir eru góðir, they better be! Kortini, frá at hava verið sjokk til nú at trúgva uppá topp, og eftir ein lemjandi ósigur í Kollafirði, má hetta metast sum skaldsligi ekvivalenturin av at drekkamunsrealistarnir hjá Carli vunnu Nobelvirðislønina í bókmentum.

Tað eru tey, ið hava hug at skíra teirra yviroptimismu og órealistiska ovfarakáti fyri „frískliga". Lutvíst samdur. Kanska ikki so snilt, men fresj. Og kanska eisini typiskt klaksvíksligt.

Men aftur til høvuðsstaðin og teir bláu. Hvør minnist ikki hasar, fyri nervarnar, fullstendiga ótolandi, óúthaldbaru dystirnar ímóti Neistanum í fjør. Ta einu ferðina, um ikki fleiri, tá „burdu" teir helst vunnið, men í evstu løtu, tá ið á stóð, mistu teir takið, ella vit endurfunnu viljan og vinnaragávuna. Úrkoman? At vit vunnu við einum máli.

Vit bjóða tí Neistanum og teirra áskoðarum vælkomnum niðan í 188, í Hoyvíkshøllina.

Umframt at sett í starv hondbóltsmennara við altjóða royndum, taka vit bara hetta árið, tá hevur H71 fingið nýggja heimasíðu.

Fríggjadagin 5. apríl var dagurin, og gjørdu vit sum vant eitt sindur burturúr við at lansera hátíðarløtuna í snotuliga móttøkuhølinum hjá Sendistovuni, forritari av heimasíðuni. Niels Uni Dam hevði funnið sær klædningin fram, og var tað hann, ið legði fram.

Felagið ynskti heimasíðu, sum stílar høgt. Og úrslitið er hareftir. Ein heimasíðu, ið stendur altjóða heimasíðum kurl, tá ið tað kemur til investering og ambitiónsniveau annars.

Tað var tí Heini Festirstein, ið bleiv biðin at deseina heimasíðuna. „Lekkur og praktisk" – effinett sum fyriskrivað. Vit takka báðar partar fyri avbera gott arbeiði og framhaldandi gott samstarv.

Við henni og H71sa nýggja Hondbóltsmennara ynskja vit øllum nýggjum H71arum, hondbóltsíðkandi limum, venjarum, hjálparum, eldsálum og, ikki minst, sponsorum, hjartaliga vælkomin til felagið.

Til hini, eini 400-500 í tali, og føroya bestu viðhaldsfjøld, ynskja vit sjálvandi enn eitt frágera gott ár í gaman og álvara.

Vissuliga, Heima í Hoyvík, í 188, er framtíðin so „etandi" kolasvørt.

Koyr á, H71!!!!!!!!!!!!!

Ítróttarfelagið Hoyvík H71
Hoyvíkshøllin, Postsmoga 1067
188 Hoyvík · www.h71.fo

NEVND
Sunneva Jakobsen, formaður
sunneva@liv.fo, 23 11 15

Gunn Ellefsen, næstformaður
ge@lawfirm.fo, 59 30 40

Agga Niclasen, nevndarlimur
h71faldarin@gmail.com, 50 86 89

Anna Dam, nevndarlimur
ad@lawfirm.fo, 51 90 82

Hallur Danielsen, kassameistari
hdanielsen@sbwcargo.com, 23 96 15

René Dahl Olesen, skrivari
renedo@faroeship.fo, 54 90 10

SAMSKIPARI
Hallur Danielsen
hdanielsen@sbwcargo.com

HEIMASÍÐUUMSITARI
Carl Herup Høgnesen
carlherup@gmail.com

Anfinnur Hovgaard
anfinnur@gmail.com

Agga Niclasen
H71faldarin@gmail.com

FALDARAUMSITARI
Agga Niclasen
h71faldarin@gmail.com, 50 86 89

SNIÐ, UMBRÓTING, PRENT OG LIÐUGTGERÐ
Pf. Føroyaprent, www.foroyaprent.fo
– svanamerktur prentlutur 541 705

MYNDIR
Jan Egil Kristiansen
26 22 40

ÚTGEVARI
H71

Pf. Jógvan Weihe

P/F Jógvan Weihe | Tel: 35 38 97 | Fax: 35 38 98
www.weihe.fo | weihe@weihe.fo

P/F Hjá Fróða

Jónas Broncksgøta 25
Tel 35 09 00
Fax 35 09 01
frodi@hjafroda.fo

Flügger

LM ELECTRIC

LM Electric bjóðar heildarveiting innan el-innlegging, ráðgeving og projektering

- El-innleggingar
- Ljós og talvur
- EDV-& telefonnet
- Hvítvørutænastu
- Døgntænastu
- Neyðstreymsskipanir Trygdarskipanir (ABA, ITV,AIA og ADK)

LM ELECTRIC - 100 TÓRSHAVN - HOYVÍKSVEGUR 53
TEL 35 12 20 - WWW.LM.FO - LM@LM.FO

Dekk

- Vit selja øll sløg og allar støddir
- Vetrardekk á sportsfelgum
- Vit hava helst besta prísin
- Góð tænasta og góðir prísir
- Bil or not to bil

- sjálvandi frá Bilrøkt!

Ring 35 88 88 og bílegg tíð
Opið gerandisdagar frá 08.00 - 17.00
og leygardagar frá 10.00 - 13.00

bilrokt.fo

Stiðjagøta 3 · FO-100 Tórshavn · Tel: 358880 · Mobil: 235880 · bilrokt@bilrokt.fo · www.bilrokt.fo

fk

REYNI SERVICE P/F
www.reyniservice.fo

Tel 353040

WAAG
& COMPANY

WAAG & Co. PF
Hoyviksvegur 63
110 Tórshavn
Tel: 31 36 66
waag@waagbilar.fo

www.waagbilar.fo

OPIÐ ER: MÁNADAG - FRÍGGJADAG: 8.00 - 17.00

WAAG
& COMPANY

vistir.fo
haraldsen



Mánaðarlig áfylling av talutíð **frá mær til tín**

vodafone

Nú kanst tú flyta ein fasta upphædd hvønn mánað til eitt ella fleiri talutíðarhald.

Sí meira á **vodafone.fo**

Treytir: Upphæddin sum verður brúkt, upp til ásetta markið, verður at sígggja á rokningini fyri inniverandi mánað. Upphæddin í Frá mær til tín verður brúkt fyrst um vanligar áfyllingar av talutíð verða fyltar á uttanfyri tænastuna. Verður 1000SMS kort fylt á, verður henda upphædd brúkt fyrst, áðrenn farið verður yvir til Frá mær til tín. Les meira á vodafone.fo

Vodafone Tel. +298 20 20 20 www.vodafone.fo

TIMBUR HT TILFAR HANDILIN

Tórshavn: Heykavegur 4, á Hálsi, tel 31 12 50 • **Kambsdalur:** tel 44 44 41 • **www.2x3.fo** •

Melinga

AUBO Køkken & Bad

NÝGGJAN KØK?

Tann evropeiski køksmótin er beint nú svart hvít og stál.
Melinga fylgir rákinum, og er einkul og eksklusivur.
Handtakið á skuffum á skápum er eitt grafiskt element við beinum linjum.
Melinga er eitt dømi uppá íblástur, tikin úr Italia, blandað við norðurlendskari mentan og eitt sindur av góðskuni hjá Aubo - og er Melingakøkurin nú ein vælkomin limur í vøruúrvalinum hjá okkum.
Støkk inn á gólvið hjá okkum, so tekna vit tær ein nýggjan køk.

H71 MYNDAR BYGDINA ÚTEFTIR!

TAÐ SIGA KATRIN OG PETUR DAHL, SUM ERU MILLUM TRÚGVASTU ÁKOÐARARNAR, TÁ H-71 SPÆLIR. TEY GLEÐA SEG, TIL NÝGGJA KAPPINGARÁRIÐ BYRJAR.

Eftir: Elin Winther Poulsen

Tá H-71 spælir heimadyst, kunnu vit vera púra vís í, at millum áskoðararnar eru Katrin og Petur Dahl at síggja. Katrin og Petur eru kendar bygdarmyndir í Hoyvík, kanska serliga millum tey, sum ikki eru børn longur. Og serliga millum teirra, sum hava gingið í Hoyvíkar Skúla. Tí í nógv ár var Petur skúlastjóri har og heldur seg tí eiga ein part av øllum teimum børnum, sum hava gingið í skúlanum.

Sjálvur nevnir hann júst hetta sum eina møguliga orsøk til, at hann ikki hugdi so nógv eftir hondbólti og ikki var so involverður í H-71, fyrrenn hann gjørdist pensionistur:

– Tá tú hevði hasar dreingirnar allan dagin, hví so renna aftaná teimum í frítíðini, eisini? spyr hann við einum skálkabrosi.

At tey ikki hugdu eftir hondbólti tey árini, harmast serliga Katrin um nú. Dótturin, Inga, spældi við Neistanum, men foreldrini sóu ikki nógvar dystir, sum hon spældi:

– Tá vóru ikki stundir, eg hevði so nógv annað um oyruni, sigur Katrin, sum umframt at arbeiða sum sjúkrarøktarfrøðingur – seinnu árini sum leiðari á Hvíldarheiminum, Naina – eisini sat í býráðnum í nógv ár.

Men tíðina, sum børnini ikki fingu, fáa ommu– og abbabørnini nú. Stór sum smá spæla tey við H-71. Og elsti ommu– og abbasonurin, Sigmundur, man vera eitt av høvuðsmálunum, tá Katrin og Petur spáka sær niðan í Hoyvíkshøllina. Sigmundur Dahl, sum hevur spælt á besta liðnum í fleiri ár, verður aftur at síggja komandi kappingarár, og tað gleðast omman og abbin um.

At tað sjálvandi serliga er Sigmundi, tey hyggja eftir á vøllinum viðganga omman og abbin erpin.

VÆL MÓTTIKIN

Katrin og Petur halda, at saman við Hoyvíkar Skúla, og nú eisini Skúlanum við Løgmannabreyt, hava kirkjan og Hoyvíkshøllin havt stóran týdning fyri Hoyvíkina. Og tey eru bæði sannførd um, at H-71 eigur stóran part í góða samanhaldinum í bygdini. Felagið gevur ein samleika, og myndar bygdina úteftir, siga tey. At øll bygdin so hevur „sligið ring“ um felagið, halda tey vera ómetaliga stuttligt.

Nevndin og tey, sum hjálpa til í felagnum, fáa eisini nøkur orð við á vegnum:

– Vit verða so fantastiska væl móttikin í høllini og tá stórir dystir eru og nógvir áskoðarar, er altíð onkur, sum syrgir fyri, at vit fáa sess, tí tey hava sett nakrar sessir av til „okkum gomlu“ fegnast tey bæði um.

VILJA FEGIN STUÐLA

Katrin og Petur hava ongantíð verið bangin fyri at bróta upp um ermar, og soleiðis er framvegis. Manga breyðflísina hava tey smurt til dystir og onnur tiltøk.

Soleiðis var eisini tann minniliga dagin í 2011, tá H-71 tapti seinnu finaluna móti kollfirðingum í Hoyvík. Tá høvdu tey bæði borið breyðmaskinuna niðan og sótu so hugagóð í H-71 hølunum og smurdu breyð til veitsluna, sum vera skuldi, tá gullið var komið til Hoyvíkar. Hetta gjørdist tó ikki so, tí vit noyddust jú tann langa túrin til Kollafjarðar dagin eftir at spæla triðju finaluna. Tá bar til, gullið kom til høldar, og breyðið varð etið.

– Ja, tað minnist eg væl, sigur Petur. Tá hevði eg gron! Men dagin eftir var sjálvandi alt gloymt. Og munnu Katrin og Petur ikki bera breyðmaskinuna niðan aftur til várs, tá breyð aftur skal smyrjast?! Bæði siga tey seg fegin vilja taka eina hond í, har tey kunnu:

– Okkum dámar tað væl, og vit vilja fegin stuðla. Tað er gull vert at hava okkurt at fara til, nú vit eru pensionerað.

Mynd: Inga Dahl

TIL ALLAR DYSTIRNAR

Katrin og Petur ætla at síggja allar heimadystirnar, og tá kappingin er komin í helvt, fer ikki ein dystur aftur við borðinum, uttan at tey bæði eru millum áskoðararnar. Tá plaga tey eisini at fara við, tá Sigmundur og hinir í bestu deildini spæla á bygd.

So tað er við spenningi, at familjan Dahl fer undir eitt nýtt kappingarár – ommu– og abbasonurin sum ein av hollastu spælarunum á besta liðnum í Hoyvík, og tey bæði eldru sum trúgvir og spentir áskoðarar.

Petur Mittún, Lars Tornefelt og Hákun Djurhuus, H71sa nýggi málmansvenjari, í samráðingum.

Mynd: Jan Egil Kristiansen

SO STENDUR ENN EITT AVBJÓÐANDI KAPPINGARÁR FYRI FRAMMAN. MANSLIÐIÐ HJÁ FELAGNUM BYRJAÐI AT VENJA HONDBÓLT BEINT EFTIR ÓLAVSØKU.

Eftir: Petur Mittún og Halgir Dahl Olesen, AA-venjarir

Uppmøtingin til venjing hevur verið góð, umleið 20 leikarar hava verið til hvørja venjing.

Sæð í mun til síðsta ár eru nakrir leikarar farnir burturav. Rógvi, Ári og Høgni D. eru farnir uttanlanda at lesa, meðan Niels Viggo, Hans Kári og Poul Kjartan ikki eru byrjaðir at venja enn.

Í mun til síðsta kappingarár er nærum eitt heilt lið burtur. Hetta er ikki nakað óvanligt hjá H71, men maður kemur í mans stað. Eisini í H71. Vit hava havt eina ávísa leikaratilgongd av eldri og yngri leikarum, eins og okkara núverandi ungu leikarar eru blivnir eitt ár eldri og harvið í enn størri mun skulu til at vísa, hvørjum tilfari teir eru gjørdir av.

Av eldri leikarum, sum eru komnir afturat hópinum, er Esbern Patursson, sum er fluttur aftur til Føroyar og Birgir Poulsen, sum síðsta kappingarár leikti við Kyndli. Tveir royndir leikar, sum vónandi kunnu taka ábyrgd og stuðla okkara ungu leikarum, tá ið á stendur.

Harumframt eru fleiri ungir leikarar komnir afturat í hópin.

Leikarar, sum hava síni bestu hondbóltsár fyri framman! Við tí hugburði til venjing, sum hesir leikarar hava vísst, eru vit vísir í, at fleiri av teirra verða at síggja á besta liði felagsins hetta kappingarárið og árini framyvir.

Sum nevnt byrjaðu mennirnir at venja skipaða hondbóltsvenjing beint eftir Ólavsøku. Tá ið vit byrjaðu at venja, blivu allir leikararnir testaðir sæð í mun til styrki, skjótleika og konditión. Vit kundu við gleði staðfesta, at felags kropsliga venjingin 2 ferðir um vikuna í summar, undir kønari hond av Snorra Patursyni hevði gjørt mun, og er nakað vit sum venjarar bara kunnu frøast um.

Í samband við uppstartin til eitt nýtt kappingarár er talan oftani um venjing, har renning og tung vektvenjing fylla nógv. Stutt sagt tung venjing, sum ikki altið er so spennandi og motiverandi, men soleiðis má tað nú einaferð verða.

Fyri at fáa eitt sindur av variatión í venjingarnar hava vit roynt at hava annarleiðis venjingar leygardagar. M.a. hava vit vant frælsan ítrótt tveir leygardagar saman við Hera Ziska úr felagnum Hvirluni. Spennandi og læruríkt venjing eisini fyri okkum venjarar.

Framhald á síðu 25 ➔



Grannskoðan // Ráðgeving // Bókhald // Roknskapur

Skalt tú meta
um framtíðina
mást tú
kenna fortíðina

SENDISTOVAN

WWW.JANUAR.FO

januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

Takk fyri at tú stuðlar Javna

Gerst limur í Javna

Far inn á okkara heimasíðu www.javni.fo, trýst á leinkjuna „Tekna teg sum lim“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

Gerst stuðul hjá Javna

Ynskir tú at stuðla okkum við einari fastari upphædd hvønn mánað, far inn á heimasíðuna www.javni.fo og trýst á leinkjuna „Stuðulsgjald“ og fylg vegleiðingini.

Hevur tú brúk fyri hjálp í sambandi við tilmeldingina, ring so til Javna á telefon 208090 ella 514827.

javni
Hoydalsvegur 40/Loftið
FO-100 Tórshavn
Tel +298 208090
javni@javni.fo
www.javni.fo

polytan®
simonsen@polytan.dk
tlf: 0045 39405420
far: 0045 26745420
polytan ligaturf 240/el-25
FIFA 2 stjørnu góðkent

Á Føroyaprent gera vit alt grafiskt arbeiði og prenta leikskráir, atgongumerkir, plakatir, bannarar, vallaskeltir, foliu ...
hvat hevur tú brúk fyri?

Hugsa lætt ...
hugsa Føroyaprent

Føroyaprent
Tel. 314555 www.foroyaprent.fo

Nethandil
Nethandilin á foroyaprent.fo ger tað skjótt og lætt at bíleggja pappír og prentlutir.

MEGA
WWW.FACEBOOK.COM/MEGA.SMS
OUTFITTERS NATION

VIT GERA ALT
BLIKK- OG
RØRARBEIÐI

Alt til
HITA
SANITET &
VENTILATIÓN

Maria Poulsen & Co
Smyrilsvegur 8 Postboks 182 FR-100 Tórshavn Tlf. 312000

www.torshavn.fo

Skapandi, mennandi, kveikjandi

TÓRSHAVNAR
KOMMUNA



Kundatænasta við enn fleiri møguleikum

Ring bara...

Vit hava víðkað um Kundatænastuna við ráðgevum, so tær ikki nýtist at tosa við tín egna kundaráðgeva um allar fyrispurningar.

Í Kundatænastuni ráðgeva og svara vit tær beinanvegin, um eitt nú sethúsafíggling, bilfíggling, kort og netbankan.

Vit svara á tel 348 000 mánadag til hósdag til kl. 17.30 og fríggjadag til kl. 16.00.

Les meira á **www.eik.fo** um nýggju Kundatænastuna, og um hvussu tú brúkar okkum best.

348 000

eik@eik.fo

Mán. til hós. til 17.30
Frí. til kl. 16.00.

www.eik.fo

Framhald av síðu 16

Eisini hava vit verið ein felags gongutúr millum Vestmanna og Tjørnuvík, umvegis Saksun. Ein túrur á smár 40 km. Vit byrjaðu at ganga úr Vestmanna kl. 9.30 ein leygarmorgun og vóru í Tjørnuvík kl. 20.45, góðar 11 tímar seinni.

Vikuskiftið 5. til 8. september var liðið á venjingarlegu. Vit búðu á Gjárgarði og vandu í høllini á Eiði. Alt í alt ein væl eydnað venjingarlega, har blíðskapurin á Gjárgarði so avgjørt ikki manglaði. Í samband við sjálva venjingarleguna vóru venjingardystir leiktir, m.a. luttók liðið í venjingarkapping í Kollafirði.

Í samband við uppstartin hava vit leikt 6 venjingardystir. Úrslitini hava sum so verið nøktandi, samstundis sum vit hava roynt eitt sindur av hvørjum. Venjingardystirnir hava vist, at fleiri lið eru rættuliga væl fyri í ár, eisini sæð í mun til síðsta kappingarár. Hetta kemur at viðføra, at vit vantandi fáa eina sera javna og spennandi kapping, har øll liðiðni fara at taka stig frá hvørjum øðrum. Tískil er sera umráðandi, at hugburðurin og stríðsandin er til staðar til allar dystir, eisini teir sum á pappírinum síggja út til at verða lættir.

Okkara mál fyri kappingarárið er at blanda okkum í ovara partin av stigatalvuni, tvs. har sum tað er stuttligt at vera. Men av tí at minst 5 lið (kanska fleiri) kunnu blanda seg í betru helvtini av stigatalvuni, verður hetta ein avbjóðandi, men sjálvsagt ikki ein ómøgulig uppgáva.

Tað er gleðiligt at staðfesta, at yngru liðini eisini hava fingið gongd á sínar venjingar. Samstundis er tað eisini gott at síggja, at felagið enn einaferð hevur vist í verki, at miðvíst ungdómsarbeiði ikki bara er ein niðurskrivað visión, sum verður tikin fram úr einari skuffu, tá ið onkur spyr eftir henni.

Felagið vísir veruliga í verki, ferð aftaná ferð, at ungdómsarbeiðið verðir tikið seriøst, seinast við at seta Flemming Oliver Jensen í starv sum hondbóltsmennara hjá H71.

Flemming Oliver kemur sostatt saman við restini av venjarunum hjá felagnum at taka sær av yngru leikarum felagsins og lyfta hetta arbeiði víðari á leið. Nakað, vit sum venjarar hjá besta liði felagsins síggja fram til.

Ein umhugsunarsamur Hákun. Og jú, nógv er at hugsa um við trimum óførum málmonnum.

Mynd: Jan Egil Kristiansen

Vit vilja at enda takka nevndini í H71 fyri gott samstarv síðsta kappingarár og síggja fram til at samstarva komandi kappingarár. Tað er ein fragd at vera venjari í einum felagi, har ein veit at stýr er á tingunum, bæði stórum og smáum.

Eisini vilja vit takka øllum teimum, sum á annan hátt hjálpa til í felagnum. Í hesum sambandi er torført at koma uttanum stuðlafelagið, sum ger eitt stórt sjálvboðið arbeiði fyri felagið. Serliga skal ein heilsan ljóða frá leikararunum, sum eru glaðir fyri góða morgunmatin áðrenn okkara dystir, sum stuðlafelagið hevur staðið fyri.

Fyri framman stendur eitt avbjóðandi og spennandi kappingarár, sum vit venjarar hava gott mót uppá og síggja fram til.

Gott kappinngarár!
Halgir og Petur

SVART STAT-ATTACK

EG ELSKI TAÐ, TÁ IÐ POLITIKARIR LATA TØL TALA OG TØLA ÍSENN. OG VIÐ EINUM ÁVÍSUM VILJA KANN EIN MÁLLÆRU-ANALFABETUR AVMARKA SLÍKT TOS TIL EITT A-Ø UMLJÓÐ. EG MEINI TÓ, AT TAÐ BÝR NAKAÐ MEIRI SERIØST UNDIR HESUM: AT VIT SKULU LATA TØLINI TALA, MEN VITA, AT TØL EISINI KUNNU TØLA.

Eftir: Agga Niclasen

So, vitandi um hetta, fari eg at gera bæði: at lata tølini tøla uppá ein ordiliga talandi máta.

Tað er so við tølum, at eitt ávíst grundarlag skal til áðrenn tú byrjar at konkludera ella meta skikkað. Hetta ger seg galdandi til mótmælisgongur og stuðulsgongur.

Tí er tað, at eg bíði eftir, at Pro Vita gleðiboðskapsliga boðar frá, at í minsta lagi 2066 fólk vóru møtt upp til felagsins limafund herfyri. Sjálvur dragi eg á bæði um haldbærið í slíkum kolossus-tali, hvat KvF við statsgaranti hevði gjørt. Hatta, í mun til so nógvar aðrar láturligar útsagnir, hevði stovunurin faktiskt eftirkannað.

Men, havi eg fingið at vita, tað kunnu teir gott, tí Pro Vita brúkti bara somu roknimetodu sum Lgbt í síni gongu fyri, ja, tað er so tað, men tað var í summar, at finna útav, hvussu nógv vóru uppmøtt.

Annars, tá ið tú brúkar „stat“, ella skoðar og metir um hagtøl, so er tað eisini yvir tíð. Og nú



gott og væl eitt hálvár er liðið síðani nýggja heimasíða felagsins fór av bakkastokki, kunnu vit við góðari samvitsku kava í nøkur finurlig tøl, ið ikki siga heilt lítið um føroyingsins, og kanska serliga hoyvíkingsins, hvønndagsliga atferðarhátt ella netatburð.

Eitt nú, hyggja vit at talinum av vitjandi innan fyri ein tíma, tá síggja vit til dømis, at 578 menniskju (ja, tú las rætt!) vóru inni á heimasíðuni millum klokkan 02:00 og 03:00.

Altso, hvat sker? Gamaní og óført, tað er at gleðast um, at síðan er væl vitjað, men hava tit ikki øll eitt arbeiði ella skúla at fara til morgunin eftir? Og 406 fólk tímdu veruliga at tasta „h71.fo“ millum klokkan 4 og 5... um náttina. Tí ikki eitt tilvildstal. Tað stendur altso ikki einsamalt. Men eg haldi, grundleggjandi, at hesin óábyrgdarleysi info-fanatiski atburður er yvirkul. Ivaleyst fyri at kekka, hvat nýtt síðani seinast.

Tað er tó í tíðarbilinum 22-23, at heimasíðan hevur flest hits per heilan tíma, ið svarar til ein prosentpart á 6, 8.

Hyggja vit eftir, hvørjar vikudagar fólk vitja síðuna, tá vísir tað seg, at týsdagur er ein heilt serligur dagur fyri hoyvíkingar. Vitjunartalið er 6110 fyri tíðarskeiðið. Sunnudag fara hoyvíkingar í kirkju. Og aftaná hvíla teir uppá sama máta sum tey í Vík, eins og Halgubók krevur. Hvussu er og ikki, tá er væl meiri linligt á hvílidegi við einans 4487 vitjanum. Stór skomm, men Hann er glaður.

Ein annar statistikkur, ið als ikki tølar, bara talar, tí hann er so forbiið óinteressantur, er ein sortering av, hvussu ofta greinar ella tíðindastubbar eru lisnir.

Í samband við at Hallur Danielsen fylti 40 ár, høvdu vit arrangerað tvey innlegg: Hallur 40, ið var ein røðu-stílað grein ella viðurkenning; hitt, ein video, har vit sóu Hall in action. Við ialt 618 hitsum var Hallur populerari enn hasi stórtíðindini um, at KÍF vóru blivnir føroyameistarir. Selvig og kompaní fingu 310 hits, hvat má metast sum ein... tú segði tað, ein skandala.

„Herrerækken på Færøerne“ eftir Jan Ottosen, har hann vurderaði styrkina hjá AA-liðunum, er toppskorari við 1023 vitjanum, sum





svarar til 3, 32 prosent av samlaða vitjanartalinum síðani nýggja síðan sá ljósið.

„Myndir frá Partille Cup“ vóru eisini ein suksess við 1006 hitsum. Fólk elska myndir, og dokumentar-foreldur sítt avkom.

Videobrot av AA-dystum og at hondbóltsmenanri bleiv settur, og umsóknin sjálv, var eisini populer.

Hvat annað? Hmmm... jú, frásagnirnar úr Partille vóru eisini hits-hitt.

Annars liggur vitjanartalið millum knapt 200 og gott 600 um dagin. Rættiliga gjøgnumgangandi. Hin 21. juli vóru hoyvíkingar væl og virðiliga hondbóltstroyttir og hildu frí, og tá var vitjunartalið á ússaligum 51.

Men annars sera imponerandi, Hetta er rættiliga gjøgnumgangandi, og nú tá ið hondbóltsárið byrjar, kappingar og annað virksemi, rokna vit við væl fleiri vitjanum.

Og tað ger mær tað sama, um tær eru á einum týsdegi og um náttina og um tað er við hasari heilt spesiellu metoduni, ið blívur brúkt at rokna uppmøting við til stuðulsgongur, hvussu fagurligar tær enn máttu verið: bara tær eru nógvar í tali, tí eg havi faktiskt eisini eitt lív, sum eg skrivi hetta her á miðjaru nátt.

TÁ RÆTT
SKAL
VERA
RÆTT

ADVOKATSKRIVSTOVAN
Halgir Winther Poulsen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Óla Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.
Jógvan E. Winther Poulsen, adv.
Eyðbjørn Larsen, adv.
Birita S. Samuelsen, adv.

FRÚUTRØÐ 4 · POSTBOKS 6 · FO-110 TÓRSHAVN
TELEFON: (298) 35 33 35 · TELEFAX: (298) 35 33 36 · WWW.JURA.FO

SENDISTOVAN

INTERSPORT®
Thomas Dam ítróttur

Nær kom súreplið til Føroya?

Seinasta sunnudag við Faroe Ship, sjálvandi!
Hvørja viku er skipið løtt við frukt, grønmeti og øllum tí, sum modernaði føroyingurin sær sum sjálvfylgjur. Hvørja viku, alt árið. Við Faroe Ship kemur stórur partur av gerandisdegnum til landið.

Síðan 1919 hevur Faroe Ship verið fremsta samband føroyinga við útheimin. Frá fyrstu túrunum við »Tjaldrinum«, til Faroe Ship gjørdist liður í flutningskervinum hjá Eimskip – heilt úr Kina til Hamburg og á Havnarvág.

FAROE SHIP
Góð sambond síðan 1919

SPEKT kann hjálpa tær við

Bókhaldinum
Roknskapinum
Lønarumsitingini
Sjálvuppgávuni
Kapitalvinnings-sjálvuppgávuni
Rentustuðlinum
Útlendskum skatti
Afturrindan av mvg
Eftirlønum

SPEKT løggildir grannskoðarar Spf. ·Staravegur 17
Postsmoga 3258 · 110 Tórshavn ·Tel 34 34 34
Faks 34 34 35 · spekt@spekt.fo · www.spekt.fo

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Gullpakkin við keypi av nýggjum bili

Við Gullpakkanum vinnur tú hvørja ferð

Tá tú keypir nýggjan bil frá Auto Service, fylgir Gullpakkin við, sum ger at tú sleppur undan at hugsa um útreiðslur til viðlíkahald og eftirlit av bilinum næstu trý árini.

Heðin Weihe, verkstaðsleiðari

Visti tú av, at tú eigur, sambært framleiðaranum av bilinum, í minsta lagi einaferð um árið til eftirlit við bilinum fyri at varveita garantiið ?

Somuleiðis mást tú skifta olju í mun til, hvussu nógv tú koyrir, perur fara, sprinklaraveska skal fyllast á so hvørt, og so alt annað, so sum bremsur, útstoyt og stoytdoyvarar kunnu fara.

Alt hetta kann gerast til heilt fitt av peningi. Men við Gullpakkanum, sum fylgir við, fært tú alt hetta fyri einki..! Ja, í veruleikanum fært tú ein mekanikara við eykalutum í 3 ár ella til tú hevur koyrt 90.000 km, við í prísinum, tá tú keypir nýggjan bil frá okkum.

Vælkomin til eitt gott bilakeyp.

Í Gullpakkanum fært tú:

- Eftirliti og viðlíkahald av bilinum og harafturat allar neyðugar umvælingar
- Arbeiðsløn, eykalutir sum t.d. perur, viskarabløð og neyðugar veskur og viðlíkahalds- og umvælingararbeiði.
- Tað vil siga: **Ongar viðlíkahalds-útreiðslur komandi trý árini!**

Sí treytir á www.autoservice.fo

Auto Service
www.autoservice.fo

Undir Krákugjógv 19 - Postboks 3168 - 100 Tórshavn - Tel 34 54 00 - as@autoserice.fo

BYGMA
BALSLEV



Myndir: Jan Egil Kristiansen

TEY SVØRTU TØLINI

DYSTARYVIRLIT HJÁ H71 Í ATLANTIC AIRWAYS DEILDINI

Dato	Heimalið	Útilið	Úrslit
29.09.2013	StÍF	H71	29-30
09.10.2013	H71	Neistin	
19.10.2013	Team Klaksvík	H71	
23.10.2013	H71	VÍF	
27.10.2013	Kyndil	H71	
03.11.2013	H71	KÍF	
10.11.2013	H71	StÍF	
17.11.2013	Neistin	H71	
01.12.2013	H71	Team Klaksvík	
08.12.2013	VÍF	H71	
15.12.2013	H71	Kyndil	
21.12.2013	KÍF	H71	
04.01.2014	StÍF	H71	
12.01.2014	H71	Neistin	
12.02.2014	VÍF	Neistin	
12.02.2014	Team Klaksvík	H71	
19.02.2014	H71	VÍF	
22.02.2014	Kyndil	H71	
02.03.2014	H71	KÍF	
09.03.2014	Neistin	H71	
12.03.2014	H71	StÍF	
23.03.2014	H71	Team Klaksvík	
02.04.2014	VÍF	H71	
06.04.2014	H71	Kyndil	
12.04.2014	KÍF	H71	

STØÐAN ATLANTIC AIRWAYS DEILDIN

Nr.	Lið	Dystir	V.m	T.m.	Munur	Stig
1	KÍF	1	34	13	21	2
2	Kyndil	1	30	29	1	2
3	H71	1	30	29	1	2
4	Neistin	0	0	0	0	0
5	StÍF	1	29	30	-1	0
6	VÍF	1	29	30	-1	0
7	T. Klaksvík	1	13	34	-21	0

LIÐINI HESUFERÐ

H71

Málmenn:

1 Ári Egason Dam
12 Tóraldur Kollsker
21 Hanus Kristiansen

Útileikarar:

4 Rúni West Højgaard
14 Sigmundur Dahl
5 Bogi Gaard Davidsen
17 Hallur Biskupstø
13 Bogdan Florea
6 Tróndur Arge
7 Esbern Patursson
10 Birgir Poulsen
15 Sigmundur Nolsø
6 Hanus Norðberg
18 Andor Sivertsen
21 Pætur Thomsen
8 Jónas Gunnarsson Djurhuus
3 Høgni Olafsson

Høvuðsvenjari: **Petur Mittún**

Venjari: **Halgir Dahl Olesen**

Málmansvenjari: **Hákun Djurhuus**

Liðleiðarar: **Andrass Marr Poulsen, Lars Tornefelt og René Dahl Olesen**

Neistin

Málmenn:

1 Mikkjal Hansen
12 Bjørn Mouritsarson Mohr

Útileikarar:

2 Rói Berg Hansen
3 Aleks Buha
4 Terji Mørk
5 Teitur Magnusson
6 Andras Joensen
7 Jugoslav Djumic
8 Hjalti í Jákupsstovu
9 John í Innistovu
10 Herbjørn Lava
11 Beinur Davidsen
12 Kristjan Dulavík
13 Jón Ludvig
14 Teis Horn Rasmussen
15 Rúni Eliassen
16 Torstein Balle

Høvuðsvenjari: **Áki Mørk**

Venjari: **Blagoje Buha**

Liðleiðarar: **Sjúrður Thomassen**

»GOTT ER AT HAVA GÓÐAN Í RÁÐUM«

SENDISTOVAN

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4

YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 203040 · FAX 203041 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
LAWFIRM@LAWFIRM.FO
WWW.LAWFIRM.FO

JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR